12 ÁBYRGDARFULL NÝTSLA OG FRAMLEIÐSLA

# Burðardyggleiki og klædnamentan

Framleiðsla, nýtsla og burturbeining av klæðum






# Heimsmál 12, innihald 1-8

- 12.1: 10 ára karm
- **12.2: Gagnnýta og handfara náttúrutilfeingi burðardygt**
- 12.3: Minka um matoyðsl (**minka um klædnaoyðsl?)**
- 12.4: Umhvørvislig handfaring av skaðiligum evnum og spillevnum
- **12.5: Minka um ruskmongdina**
- 12.6: Fyritøkur skulu arbeiða burðardygt
- 12.7: Burðardygd í almennum innkeypum
- 12.8: Tryggja neyðuga vitan og upplýsing

# Heimsmál 12, innihald a-b-c

- 12.a: Hjálpa menningarlondunum at førka seg móti burðardyggari nýtslu og framleiðslu
- **12.b: Menna amboð til burðardygga ferðavinnu, sum fremur staðbundna mentan og framleiðslu**
- 12.c: Endurskoða stuðul til lívrunnin brennievni

# Børn til arbeiðis

- Hector Malot 1878: Frændaleysur
- Umsett til Føroyskt 1961
  - Lisin í útvarpinum sum framhaldssøga

- **“Eg veit um eina verksmiðju, har raskastu børn sóu út sum beinagrindir og fingu bróstsjúku, tá ið tey høvdu verið har eini tvey ár.”**



# Børn arbeiða í klædnaídnaðinum



- Tilfar til klæðir var eitt tað fyrsta, sum varð framleitt á verksmiðjum.
- Har sum bomullin vaks vórðu trælir nýttir, eisini børn
- Í verksmiðjunum arbeiddu børn fyri lítla løn
- Hvussu eru umstøðurnar hjá børnum í 3 londum?
- Har eru enn nógv børn sum arbeiða undir umstøðum, sum ikki eru nógv frægari enn fyri 150 árum síðani
- Vit keypa bíligt, men onnur gjalda prísin.








# “Ting” og teirra týdningur

- Tá hugt verður eftir brúkslutum frá einum mannfrøðiligum (antropologiskum) sjónarmiði sæst, at tingini (artefactini), sum ein ávísur bólkur hevur, sigur nógv um teirra mentan.
- Tingini, sum verða framleidd og nýtt av einum ávísum bólki kann kallast materiella mentanin, hjá bólkinum.
- Men hvussu ber tað til, at **ting** kunnu siga nakað um søguna hjá einum bólki? – Tí tey bera týdning við sær.
- Vit nýta symbolskar lutir. Bilurin eg koyri, klæðini eg eri í, bókin eg lesi, tey siga øll somul nakað um meg, og hvør eg eri.

















# Hvat siga klæðini?

- **Framleiðsla**
- **Praktisk nýtsla**
- **Nýtsluhættir**
- **Estetiskt virði, útsjónd**
- **Meining**
- **Hugsjónarligur týdningur**
- **Aldur og høvi**

















# Hvaðani komu klæðini 1930 – 1970



- Klæðini blivu í stóran mun framleidd lokalt
- Tey skuldu hava eina góðsku, so tey hildu væl
- Tey blivu hildin viðlíka og bøtt og stoppaði
- Mammur gingu til seymiskeið at læra seg, og seymaðu uppá børnini
- Seymað varð eisini burturúr gomlum
- Barnaklæðini blivu latin víðari tá tey vóru for smá
- Tú fór í tað sum var, ikki nógv í at velja







# Nógv er at fáa og tað er bíligt at keypa 1980 - 2010

- Klæðini vórðu hópframleidd langt burturi og tey vóru bílig.
- Tað varð ikki hugsað um, hvar tað var framleitt, og undir hvørjum umstøðum.
- Tilfarið, sum skuldi til fyri at seyma klæðir sjálv var lutfalsliga dýrari, so tað loysti seg ikki longur at seyma klæðini.
- Hugburðsbroyting
  - frá tí at klæðini skuldu vera so mikið góð, at tey kundu brúkast leingi, av fleiri børnum, til at
  - klæðini verða keypt til eitt barn, sum kanska ikki slítur tey upp
  - góðskan hevur ikki longur tann stóra týdningin
  - børn fara ikki í hvat sum helst

# Burðardygggleiki á øllum økjum 2010 – 2018

- Hugburðurin er aftur í broyting
- Burðardygggleiki er komið á breddan innan øll økir.
- Burðardygggleiki innan fiski- og alivinnu
- Innan orkuframleiðslu og nýtslu.
- Men eisini innan klædnaframleiðslu verður sett spurnartekin við, hvørji árin eru á umhvørvið, og hvussu arbeiðsumstøðurnar eru hjá teimum, sum arbeiða í hesi vinnu.

# Klædnaframleiðsla langt frá brúkaranum

- Klæðir eru bílig.
- Tey eru ofta úr vánaligum tilfari og illa úr hondum greidd,
- Eftir stutta tíð tíma vit ikki at brúka tey longur, men koyra tey burtur.
- Nógva staðni verður rátt til at lata til endurnýtslu, og keypa frá endurnýtsluhandlum
- Tíverri eru klæðini ofta so mikið vánalig, at tað ikki longur loysir seg.
- Úr endurnýtsluhandlum, bæði í Føroyum og aðrastaðni, verður sagt
    - "nógv av klæðunum eru litfarin, niblut, farin av lagi, og sum heild vánalig, og kunnu tí ikki seljast í handlinum"

# Hvønn týdning hevur framleiðsla, nýtsla og burturbeining í samband við Burðardyggleika.

- Náttúrutilfar – í hvønn mun er tað burðardygt?
  - Bomull, lín, silki, ull, endurskaptir tægrir, t.d. viskosa
- Eru kunstigu tægrirnir kanska í summum førum burðardyggari í framleiðsluni? Og hvussu við burturbeiningini?
  - Nylon, polyester, akryl osv.






# Prísur / keyp

- Um burðardygg klædnaframleiðsla skal vera fyri vanlig fólk, so má prísurin vera kappingarførur
- Góðu pløggini úr vistfrøðiligum tilfari kosta so nógv, at tey eru ein luksusvøra
  - Greinir í “Håndarbejde i skolen” vísa til tvístøðuna millum at vilja framleiða burðardygt, og at fáa prísin kappingarføran



# At taka burðardygga hugsan við í klædnaframleiðslu

- Visa hvaðani luturin kemur
- Fortelja eina søgu – siga frá nýtsluni – útfylla ein veruligan tørv
- Loyva brúkaranum at skilja og síggja hvat hon velur.
- Partur av arbeiðinum hjá sniðgevanum er at skapa lutir, sum vekja ynski, hugflog og dreymar.
- Føroyskir sniðgevar kunnu vera við til at menna burðardygga ferðavinnu, við at arbeiða út frá staðbundnu mentanini og fortelja søguna.



# Burturbeining av klæðum

- Fyrr vórðu klæðini brúkt inntil einki var eftir av teimum
- Nú á døgum verður nógv blakað burtur, tá vit møðast av tí
- Handlar koyra klæðir burtur, tá tey eru farin av móta, heldur enn at selja tey bíligt.
- Stórar handilsfyritøkur eru avdúkaðar í at koyra góð, óbrúkt klæðir at brenna.
- Kunstigu tægrirnir, akryl, polyester, nylon osv. niðurbrótast ikki á náttúruni.
- Stórur partur av dálkingini av náttúruni er eisini klædnavørur



# Framtíðin – hvat kann eg gera?



- Hava færri pløgg, og brúka tey longur
- Hugsa seg væl um áðrenn keypt verður
- Velja gott tilfar
- Væl gjørd, so tað loysir seg at halda við líka
- Lata pløggini víðari til onnur, tá tey ikki longur passa
- Keypa í endurnýtsluhandlum
- Fara væl við klæðunum, halda viðlíka.